# ...itfagra landið



*- Eg kom til Føroya við tí lyfti frá konu míni, at vit kundu flyta aftur til Belgia, um eg ella vit ikki trivust í landinum. Alt var fremmant, og eg visti ikki, hvat eg fór í holt við. Men lyftið frá Ruth havi eg ikki brúk fyri í dag, tí eg trívist í Føroyum. Landið er trygt og gott fyri míni børn at vaksa upp í. Eg havi eitt arbeiði, sum mær dámar sera væl, og sum heild njóti eg lívið í Føroyum, slær 44 ára gamli Rabah Benbakoura úr Algeria fast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

meg at kenna meg væl. Hetta fari eg ongantíð at gloyma, slær Rabah fast.

Skjótt vórðu børn sett í verðina, og í dag eru tey trý í tali.

## Vrakaði Islam

Orsakað av at familjan flutti úr Algeria, longu tá Rabah var tvey ára gamal, hevur hann í dag avmarkað samband við sítt heimland. Hann kennir seg eins nógv sum belgiara, men foreldur hansara syrgdu fyri, at hann fekk algersku mentanina inn við móðurmjólkini. Rabah kemur frá eini muslimskari familju, men hesin parturin av bakgrund hansara hevur hann vent bakið.

– Eg vendi Islam bakið á ungum árum. Eg tók ikki undir við teimum mongu reglunum, sum eru í islamsku siðvenjuni. Eg var og eri serliga ímóti, at kvinnan ikki hevur hægri status í islamsku mentanini, sigur Rabah.

Í staðin konverteraði hann sum ungur til protestantiskan kristindóm. Hann greiðir frá, at hann longu sum 12 ára gamal valdi protestantiskan kristindóm sum skúlafak, hóast honum stóð í boði at fáa undirvísing í bæði katolisismu og Islam. Hann var serliga hugtikin av, at trúgvin er alfa og omega í kristnu trúnni. At tað ikki snýr seg um reglar og fleiri reglar, men um eina innaru sannføring.

– Tað hevur altíð búð ein lítil uppreistrarmaður í mær, og eg vendi mær tíðliga í mínum lívi ímóti trúnni hjá mínum foreldrum. Men hetta góvu tey mær eisini loyvi til, minnist Rabah aftur.

## Afrikanska vónloysið

Gjøgnum sítt lív hevur hann lisið alt tað, hann hevur fingið fatur á um Algeria. Og tað er við sorg, at hann eygleiðir sítt heimland.

– Algeria er eins og restin av Afrika. Kriminalitetur, korruptión, ófriður og fátækradømi herjar, og tað er ikki vorðið betri, síðani landið gjørdist sjálvstøðugt í 1960, greiðir Rabah frá.

Sum upprunaligur borgari úr triðja heiminum er Rabah áhugaður í viðurskiftunum í Afrika. Hann fylgir væl við, hvat fer fram í hansara heimlandi og á afrikanska kontinentinum, og hann hevur eisini sínar meiningar um, hvørjir trupulleikarnir eru.

– Útbúgving, útbúgving og aftur útbúgving. Hetta er tað, sum triði heimurin skríggjar eftir. Trupulleikarnir verða ikki loystir, so leingi fólkið ikki hevur atgongd til útbúgving, slær Rabah fast.

Men er hetta ikki ein spurningur um pening? Eru manglandi útbúgvingarmøguleikarnir í triðja heiminum ikki orsakað av, at eingin peningur er at fíggja eitt útbúgvingarverk?

– Tað er partvís ein myta, at afrikansku londini ikki hava ráð. Algeria situr á einum eldorado av náttúrutilfeingi og útflytir eina rúgvu av olju og gassi, sum er høvuðsídnaðurin í landinum. Hesar milliardirnar kundu saktans verðið nýttar at byggja skúlar kring alt landið, so nýggja ættarliðið fekk eina útbúgving. Trupulleikin er ikki vantandi peningur. Trupulleikin er, hvussu peningurin verður nýttur, sigur Rabah Benbakoura.

Hann metir, at vit skilja ikki trupulleikan, um vit ikki skilja, at fleiri afrikanskar stjórnir als ikki hava áhugan í at menna sítt land og fólk. Tvørturímóti er fólkið teirra fíggindi, tí fólkið er einasta hóttanin móti teirra valdi og ríkidømi. Tí gera valdsharrarnir alt fyri at varðveita sítt vald, og tí endar allur peningurin í lummunum á teimum fáu. Fólkið skal í staðin avvápnast og haldast í leinkjum.

– Eg eri dapurskygdur, tá eg skal spáa um framtíðina hjá afrikanska fólkinum. Neyðhjálpin úr vesturheiminum loysir ikki kreppuna, tí at høvuðstrupulleikin er ikki fíggjarligur, sum so mangir vesturevropearar halda. Trupulleikin er býtið av fíggjarliga tilfeinginum, sigur norðurafrikanski maðurin við eini rødd, sum avdúkar, at hetta evnið liggur honum tungt á hjarta.

Seinasta ferðin, at Rabah vitjaði sítt heimland, var í 1985. Á veg út úr landinum var hann steðgaður av nøkrum vaktarmonnum, sum søgdu, at hann manglaði nøkur pappír. Hann var tí noyddur at vera verandi í Algeria næstu tíðina, áðrenn hann gjørdi tað, sum altíð loysir seg: Hann gav røttu persónunum tann peningin, teir vildu hava, og so slapp hann umborð á flogfarið, sum førdi hann heim aftur til Belgia.

Og síðani 1985 hevur hann ikki vitjað sítt heimland.

## Vitan er vald

Eftir at hava hugleitt um heimlondini Algeria og Belgia er Rabah Benbakoura ikki í iva um sítt svar, tá hann verður spurdur, hvat hann kundi hugsað sær øðrvísi við føroyska samfelagnum. Hvat hann onkursvegna kann finnast at við sínum "ælabogalandi".

– Tit skulu leggja størri dent á útbúgving. Hóast tit hava eitt útbúgvingarverk, sum fevnir um tey flestu, eiga tit at satsa meiri uppá útbúgving, vitan og gransking. Bíðilistarnir eru ov langir til fleiri útbúgvingar í Føroyum, møguleikarnir at granska eru ov avmarkaðir, og tykkara universitet skuldi verið nógv størri við fleiri tilboðum, slær Rabah fast.

Tað sæst á øllum brøgdum, at Rabah er sera upptikin av útbúgvingarpolitikki. Hann sigur, at eitt av fremstu idealum hansara er, at eitt og hvørt menniskja skal hava rætt til at nema sær kunnleika. At útbúgving - eisini hægri útbúgvingar - er ein mannarættur, sum skal virðast. Tí skuldu møguleikarnir og tilboðini í Føroyum sambært honum verið bæði fleiri og fjølbroyttari.

Og meðan prátið snýr seg um útbúgving, nevnir Rabah eitt eyðkenni við føroyingum, sum ikki hevur verið nógv at hoyrt til fyrr.

– Eitt tað fyrsta, eg legði til merkis í Føroyum, var, at føroyingar fylgja ser væl við, hvat fer fram úti í stóru verð. Í Belgia upplivdi eg, at hvør hevði nóg mikið við sínum, men í Føroyum fái eg eyga á ein nógv breiðari og víðari áhuga fyri tí, sum hendir uttan fyri landoddarnar. Eg haldi orsøkina vera, at av tí at tit liva á eini isoleraðari oyggj, verða tit noydd at fylgja við gongdini uttanfyri Føroyar og gerast við hesum meiri global enn borgararnir á evropeiska meginlandinum, sigur Rabah.

Og tí metir hann, at føroysku myndugleikarnir skuldu gagnnýtt globalu tilvitskuna í størri mun. M.a. við at kombinera globalu tilvitskuna við fakliga vitan, so føroyingar kunnu standa seg betri í kappingini við útheimin.

– Lívið snýr seg jú í stuttum um at fáa vitan og innlit í ta tilveru, vit eru partur av. Vitan er vegurin fram, bæði persónliga og samfelagsliga, og hetta er fremsta uppgávan hjá eini og hvørjari tjóð at veita sínum borgarum, endar Rabah Benbakoura úr Algeria.